# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Steinmund rundar 70

Í dag fyllir Steinmund Klakkstein í Klaksvík 70 ár. Steinmund er føddur og uppvaksin í Klaksvík. Foreldrini vóru Elsa og Heine Klakkstein, sum búðu í Vági í Klaksvík. Steinmund er elstur av trimum systkjum.

Steinmund lærdi til blikksmið á Blikksmiðjuni á Fornagørðum og tók sveinroyndina í Danmark í 1959. Hann hevur eisini arbeitt á vatndeildini hjá Klaksvíkar kommunu, hann arbeiddi í fleiri ár sum bilmekanikari, og eitt skifti var hann leiðari fyri sløkkiliðið í Klaksvík.

Seinnu árini hevur Steinmund tikist við ymiskt fyrifallandi arbeiði, og hann er framvegis lættur á fótum, røkin og skjótur í vendingini. Bæði í ár og í fjør hevur hann gjørt ferð til Grønlands saman við øðrum handverkarum at gera ábøtur á leguhúsini í Nuuk.

Steinmund giftist í 1963 við Jórun (f. Simonsen) úr Fuglafirði, og í 1968 fluttu tey í húsini á Stongunum, har tey framvegis búgva. Tey eiga fýra synir – Heini (1964), Esmar (1968), Eyðun (1972) og Bárður (1976). Tríggir teir elstu búgva við familju í Klaksvík, meðan Bárður í løtuni er búsitandi við familju í Esbjerg. Nú eru abbabørnini blivin 9 í tali.

Føðingardagurin verður hildin á Skáltavegnum 4.

†

### Andlát og jarðarferðir

**Hansa Hansen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 86 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hóskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Hansu, kunnu lata Frelsunarherinum eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Dagurin**
**5. september. Regina**, deyð umleið ár 300. Ung rómversk genta, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir. Navnið er av latínskum uppruna og merkir drotning.

## Símun V. Arge 60



Fríggjadagin 5. september verður Símun V. Arge, fornfrøðingur, seksti. Símun kom í starv á Føroya Fornminnissavni sum savnsvørður í fornfrøði í 1982, og í 1986 gjørdist hann leiðari á fornfrøðideildini. Hann hevur tó verið knýttur at savninum væl longri, nevniliga síðan 1970, áðrenn hann fór niður at lesa fólkalívsfrøði og miðaldarfornfrøði, og eisini í ferium í lestrartíðini. Hesa tíðina var hann eisini við í fornfrøðiligum og antikvariskum arbeiði í Danmark og Grønlandi.

Sum fornfrøðiligur deildarleiðari hevur Símun havt fyriskipan og eftirlit við øllum fornfrøðiligum rannsóknum, ið hava verið í Føroyum seinastu nógvu árini. Hann hevur tann serliga eginleika, at hann hevur lætt við at koma í samband við fólk og dugir at røkja hesi sambond, og hesum hevur stovnurin mangan notið gott av. Hann hevur skil á, hvat hendir á økinum í grannalondunum og veit, hvar hann skal venda sær, tá ið brúk er fyri útbúnum fólki í fornfrøðiligum útgrevstrum, tá ið rannsóknir brádliga stinga seg upp, tí samfelagsútbyggingin krevur tað. Eisini hevur hetta lyndið mangan havt við sær, at gjørligt hevur verið at finna loysnir, soleiðis at mentanarminni ikki eru farin fyri bakka hóast neyðugu samfelagsútbyggingarnar.

Ein týðandi táttur í hesum er gransking av fornfrøðiligum evnum og kunning um virksemið, bæði í fólksligum og vísindaligum ritgerðum eins og gjøgnum framsýningar. Serliga nær hjarta hansara øll árini, og serliga tey seinastu, hevur verið gransking av fornfrøðilugum leivdum heima á Sandi, har heilt serligar umstøður eru at grava fram nýggja vitan um fortíð okkara. Í samstarvi við viðurkendar útlendskar granskarar stendur hann har á odda fyri forkunnugum vísindaligum rannsóknum, sum veita okkum nýggja vitan um gerandislív í víkingaøld og eru við til at seta luppin á Føroyar sum sera áhugavert øki í alheims fornfrøðiligum høpi.

Símun hevur í starvstíð síni eisini verið góður hjá landsmyndugleikum at heita á, tá ið á hevur staðið. Í trimum umførum hevur hann verið settur landsantikvarur, í tilsamans 4 ár. Í hesum álitisstarvi hevur hann lagt dent á at fáa fjøltáttaða stovnin, sum Føroya Fornminnissavn er, at virka sum eina væl samansjóðaða eind, har starvsfólk trívast. Og tað hevur eisini eydnast.

Føðingardagurin verður hildin við móttøku í framsýningarhølunum hjá Føroya Fornminnissavni í Brekkutúni 6, millum kl. 15.30 og 19.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## Jeanne Jensen 80 ár



Leygardagin 6. september fyllir Jeanne Jensen (fødd Rubeksen) undir Svartafossi, 80 ár.

Jeanna er fødd í Havn, og foreldur hennara vóru Samuel Sofus Rubeksen (vanliga nevndur Sámalí Smiðjustovu) og Agnes Rubeksen (fødd Jacobsen ættað úr Norðastovu á Toftum).

Jeanna var gift við Holgar Jensen, møbilhandlara frá Broager í Jútlandi, sum doyði í 1986.

Tey bygd hús undir Svartafossi, har foreldrini hjá Jeannu høvdu bygd, og býr Jeanna har í dag.

Jeanna og Holgar fingu tvær døtur, onnur býr í Svendborg og hin í Tórshavn.

Jeanna og Holgar høvdu stóran møbilhandil í Havn, og vóru tey saman um hetta til tey stongdu handilin í áttatiárinum.

Tey hava eisini verið virkin innan felagslívið í Havn, og vóru tey m.a. við í GHM og stovnan av Dansifrøi. Jeanna er rættuliga aktiv, tað er ikki dagur at hon ikki hevur samband við síni børn, ommu- og langommubørn, eins og familjuna í Havn.

Føðingardagurin verður hildin saman við børnunum á Louisenlund nr. 23 Svendborg.

**HM.**